KUNNINGARSKRIV

2019

SØRVÁGS KOMMUNA

Góðu borgarar í Sørvágs kommunu

Síðstu mongu árini hevur tað verið siðvenja í kommununi, at borgarar okkara við árslok fáa eitt kunningarskriv, har greitt verður frá, hvussu gingist hevur í brátt farna ári, og hvørjar ætlanir bygdaráðið hevur í árinum, sum kemur.

Hóast vit áhaldandi verða undirdíkt við kunning og tíðindum, fara vit aftur í ár at skriva eitt tíðindaskriv, og á síðstu síðunum leggja vit høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlanina fyri 2020 og høvuðsyvirlit yvir roknskapin fyri 2018.

Ásannandi tað, at fólk flest brúka talgildu miðlarnar og í samsvari við tíðarandan, har fokus verður sett á umhvørvið, velja vit aftur hesa ferð at lata vera við at oyðsla óneyðugt við pappíri. Skrivið verður tí ikki borið út í hvørt hús, men lagt á heimasíðu okkara. Um onkur fegin vil hava eitt eintak í hondina, fæst tað á kommunuskrivstovuni.

Fíggjarætlanin 2019

Sambært fíggjarætlanini fyri 2019 var ætlanin at gera íløgur fyri uml. 15.990 mió. kr. í 2019 innan hesi øki:

Almanna- og heilsumál:	2.340.000,-
Børn og ung:	5.700.000,-
Undirvísing:	450.000,-
Mentan og frítíð:	200.000,-
Teknisk mál:	7.000.000,-
Kommunal virki:	300.000,-

Størsti parturin av íløgujáttanini fyri 2019 var ætlaður til økini almanna- og heilsumál, børn og ung og tað tekniska.

Tað eru tíbetur góðar tíðir í landinum enn . Viðgongdin er stór. Vit hava búskaparvøkstur, fólkavøkstur, lítið arbeiðsloysi, hækkandi løntakaratal og lága rentu. Sjálvandi er tað at fegnast um, men tað hevur eisini tað við sær, at tað viðhvørt er trupult at fáa avgreitt tær ætlanir, ið bygdaráðið hevur stungið út í kortið. Hendan staðfestingin krevur, at bæði politikkarar, umsiting og borgarar í kommununi mugu brynja seg við toli, tí arbeiðstakarar hava so mikið nógv at gera, at okkurt má bíða. Tað hava vit tikið til eftirtektar aftur í ár. Peningur, ið var settur av til verkætlanir í 2019, er ikki altíð brúktur sambært ætlan, men er játtaður til onnur átrokandi endamál, ið tað hevur borið til at fáa avgreidd, ella liggur í kassanum sum gjaldføri til íløgur fyri næsta ár.

Hvat er so framt í verki

Eldraøkið var lagt út til kommunurnar at umsita hin 1. januar 2015. Kommunurnar í oynni, ið eru saman um Heimatænastuna í Vágum, skulu sambært lóg veita okkara gomlu og óhjálpnu eina góða og fjølbroytta tænastu. Um somu tíð var **heimið á Sýnini** yvirtikið, og tí tørvaði stórar ábøtur. Yvirtøkan av heiminum fekk sjálvsagt eisini fíggjarligar fylgjur fyri báðar kommunurnar. Landið veitti okkum eitt rentu- og avdráttarfrítt lán upp á 15.750 mió. kr. og eitt rentufrítt lán upp á 15.750 mió. kr. Avdráttartíðin av láninum frá landskassanum er 13 ár. Hetta lánið verður goldið í mun til fólkatalið, sum var í kommununum við árslok yvirtøkudagin. Okkara kommuna skuldi avdraga lánið í 4 ár og 8 mánaðir. Sostatt vóru vit liðug at rinda okkara part av láninum frá landskassanum í august 2019. Heimið verður umvælt eftir kostnaðarmeting, sum Landsverk gjørdi. Tá arbeiðið varð útboðið, vísti tað seg, at kostnaðurin var væl hægri, enn mett var frammanundan. Kommunurnar samdust um at hækka sín lut í fíggingini við 5 mió. kr. Okkara lutur í mun til meirútreiðsluna varð 1.8 mió. kr. Sostatt var væntað, at umvælingin í fyrstu atløgu fór at kosta kr. 36.5 mió. krónur

Tíðin hevur víst, at hesin kostnaður fer ikki heilt at halda. Í skrivandi stund sær tað út til, at neyðugt verður at játta eina minni eykajáttan, soleiðis at báðar kommunurnar koma at rinda sín part av umleið 2 mió. í meirkostnað.

Tær báðar ovaru hæddirnar eru sum so liðugt umvældar, og økið uttan um heimið og parkeringsplássini eru asfalterað. Eftir er at fáa kjallarahæddina umvælda, og peningur er settur av á fíggjarætlanini fyri 2020 til hetta síðsta arbeiðið.

1. oktober í ár var Jóngerð M. Nielsen sett sum nýggjur leiðari fyri Heimatænastuna í Vágum.

Børn og ung. Tað er sjálvsagt, at kommunan nøktar tørvin á barnaansing og skapar karmar, so námsfrøðiliga arbeiðið við umsorgan, í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, mennir og mentar børn og ung á fullgóðan hátt. Vit fegnast um, at barnatalið í kommununi er støðugt vaksandi. Men tað merkir eisini, at tørvurin á stovnsplássum er vaksandi. Í fjør heyst var ásannað, at neyðugt er at økja um plássini.

Á FÆ2019 varð peningur settur av til at útbyggja **Alvalon** við nýggjum vøggustovum. Gjørt var av, at ætlanin skuldi gerast í støðugum og tøttum samarbeiði við starvsfólk á økinum, so endaliga úrslitið gerst nøktandi. Ásannast má, at slíkt samarbeiði og samskifti ger mun, men tað er eisini tíðarkrevjandi og leingir um arbeiðstilgongdina. Í februar var eitt uppskot góðkent av øllum pørtum: https://www.sorvag.fo/index.php/kommunan/tidindi/674-utbygging-av-alvalon, men tað varð seinni kolldømt. Eitt endaligt og snøggari skitsuuppskot frá Westtech var samtykt í bygdaráðnum í november mánað. Fýra nýggjar vøggustovur verða bygdar omanfyri Alvalon, har vit ognaðu okkum eitt 6088 fermetrar stórt øki í fjør. Nú eru vit í ferð við at keypa umleið 4000 fermetrar at leggja afturat. So er eftir at prosjektera, planera og byggja.

Sýslan verður nógv brúkt. Um dagin halda tey 6-7 ára gomlu og frítíðarskúlin til í henni. Ungdómstilboðið**,** sum læt upp í Sýsluni 1. januar í 2018, er sera væl umtókt. Meira enn 120 børn og ung tilsamans eru limir og ganga í ungdómshúsinum tey fýra kvøldini í vikuni, tá ið opið er. Neyðugt er at viðlíkahalda ein so gamlan bygning, ið verður so nógv brúktur. Í summar hava Pól Sigmund og Per Henrik drenað rundanum og pussað grundina á Sýsluni**.** Arbeiðið at klæða hana við timbri er so smátt farið í gongd, tí plastklædningurin, ið nú er á, er illa farin og ikki serliga haldgóður. Hann má skiftast. Tað var Kári Simonsen, sum í sínari tíð klæddi við plastinum. So hann fer saman við versoninum at fáa nýggja klædningin á Sýsluna.

Serstovan í skúlanum er nógv og væl umvæld í ár. Eitt sindur av peningi var settur av á FÆ2019 til umvælingina. Men tá ið farið var undir arbeiðið, sóu vit, at skilabest er at gera arbeiðið ordiliga. Tað hevur so eisini viðført, at neyðugt hevur verið at játta eina lítla mió. krónur í eykajáttan í árinum. Allir teir umleið 10-12 næmingarnir í Vágum, ið hava tørv á einum serligum skúlatilboði og ganga her í okkara skúla, kunnu fegnast um góðu umstøðurnar, ið nú eru.

Skúlin í Gásadali hevur verið brúktur til gudstænastur, fundir og smærri samkomur, síðani niðara hæddin var umvæld fyri nøkrum árum síðani. Nú hava gásadalsfólk og avbygdafólk við tilknýti til bygdina fingið eitt stað at samlast til smærri tiltøk, tí í ár er alt loftið gjørt í stand. Vit hava millum annað fingið gjørt trappurúmið upp úr gongini og ein sera snøggan handgjørdan køk. Magni Nielsen, ið er slektaður úr Gásadali, hevur greitt eitt framúrskarandi arbeiði úr hondum.

Aftaná at jólatræið var tendrað í bygdini síðst í november mánað, var hølið tikið í brúk fyri fyrstu ferð. Tá vóru umleið 40 fólk og fingu sær drekkamunn á loftinum, og tað riggaði stak væl.

Ásannandi, at bygdin fær so nógv ferðafólk á vitjan, hevur kommunan eisini roynt sum frægast at bøta um onnur viðurskifti. Hampað er um vesi, og bøtt er um gøtur nærhendis Múlafoss, so tær er hóskiligar at ganga á.

At gera byggisamtyktir tekur langa tíð. Vinnunevndin hevur í drúgva tíð arbeitt við at dagføra byggisamtyktina fyri Gásadal. Eftir borgarafundir, hoyringsfreist og gjøgnumgongd av innkomnu klagunum hevur bygdaráðið, eftir tilmæli frá vinnunevndini, samtykt, at gerast skal eitt nýtt uppskot.

Mykines. Síðst í juni mánað í ár var formlig avtala gjørd millum P/F Magn, Elfelagið SEV, Heilsu- og innlendismálaráðið og Sørvágs kommunu um oljuflutning til Mykinesar. Í avtaluni eru partarnir samdir um at loysa málið um oljuflutning til Mykinesar soleiðis, at tað slepst undan at flyta oljutunnur út í

oynna. Tíverri komu vit ikki rættliga á mál í summar. Men vit vóna, at tað sum skjótast fer at bera til hjá íbúgvum í oynni - eins og hjá øllum øðrum føroyingum - at kunna bíleggja og fáa olju til húshaldini á ein lættari hátt.

Í ár var Gutti Guttesen liðugur at stoypa bakkaverjuna undir Fjørdalsgøtu. Vónandi fer hon at roynast væl. Aftur í heyst hevur kommunan í skrivi til landsins myndugleikar víst á, at neyðugt verður sum skjótast at bøta um atløgusíðuna við m.a longdum bryggjukanti og girðing fram við, tí har er als ikki nóg trygt til stóra ferðafólkatalið í Mykinesi.

Grundøki. Vit halda, at tað hevur stóran týdning, at kommunan gongur undan, soleiðis at tørvurin á grundstykkjum altíð er nøktaður. Seinasta kommunala útstykkingin í Sørvági var gjørd í Billubønum uml. 2008, og vit eru í uppisetri við grundøkjum. Sitandi bygdaráð fór alt fyri eitt í eina tilgongd at fáa keypt øki til útstykking. Hetta eydnaðist okkum. Og í 2017 keyptu vit eitt nærum 35000 fermetrar stórt øki til útstykkingar, har pláss verður fyri umleið 30 sethúsum og møguligari íbúðarbygging. Í fyrsta umfari verður útstykkjað til 18 grundstykki, sum við einum fríøki í miðjuni fara at hava útsýni út móti fjørðinum og oman í bygdina.

Umleið 6 mió. krónur vóru settar av á fíggjarætlanini fyri 2019 til útstykkingina. Fyrst í mai mánaða var spakin settur í á Middagsvarða, og KJO fór til verka. Eftir ætlan skuldi arbeiðið verða liðugt í oktober í ár. Seinni er tað broytt til seinast í februar næsta ár, tí gjørt er av, at hvørt einstakt grundøki eisini skal planerast. Men tað eru nøkur viðurskifti, so sum spreinging og veðurlag, ið benda á, at arbeiðið verður seinkað enn meira. KJO væntar, at hansara arbeiði verður liðugt beint fyri summarfrítíðina. Síðani skulu stykkini matrikkulerast. Tá ið tað er gjørt, eru tey klár at selja.

Mett verður, at tá ið grundstykkini eru klár at selja, fer kommunan at bera ein kostnað upp á umleið 13 mió. krónur fyri tey – hetta er uttan sjálvt keypið av økinum, asfalt og gongubreytir.

Bústaðir eigur fimm íbúðir í Billubønum. Í fjør keypti og planeraði kommunan eitt grundstykki undir Bólheyggi í Sørvági, sum Bústaðir keypti aftur frá okkum. Bústaðir hevur gjørt avtalu við Westtech um, at felagið byggir fimm íbúðir á økinum. Arbeiðið hjá Westtech er farið í gongd, og íbúðirnar verða væntandi lidnar á vári 2021. Hetta merkir, at tá eru 10 leiguíbúðir í bygdini til tey, ið ikki vilja eiga, men heldur leiga.

Bátabrýr í bátahylinum. Eingin ætlan var um at skifta gomlu bátabrýrnar út. Heldur ikki var nakað oyra sett av á FÆ2019 fyri tær. Hetta, hóast illgruni var um, at tær ikki vóru í serliga góðum standi. Hildið var, at neyðugt var at fáa tær kannaðar. Vit fingu kavarar við skili fyri slíkum at gera kanningina í januar mánað. Niðurstøðan var hon, at tær eru í so vánaligum standi og áttu helst at hava verið skiftar út fyri nógvum árum síðani. Neyðugt var at tryggja tær við ketum fyribils, til nýggjar brýr vórðu fingnar til vega og at finna tær 3 mió. krónurnar, sum er prísurin fyri 80 metrar. Tað merkir, at onkur ætlan fyri árið er slept, og at ein eykajáttan skuldi játtast av tøkum peningi.

Síðst í mars var skrivað undir avtalu um keyp av 80 metrum av bátabrúgvum við ankringsskipan av serligum slagi, ið kallast seaflex: https://www.sorvag.fo/index.php/kommunan/tidindi/675-seaflex Í summar varð uttasti parturin av brúgvunum so skiftur.

Kaikranin til útróðrarmenninar er gamal og slitin. Bygdaráðið hevur samtykt at keypa nýggjan krana. Hann verður keyptur gjøgnum Vestmek, og teir fara eisini at seta hann upp.

Spæliplássið **á Stakka**, har atlit eru tikin at samveru millum børn og foreldur, var liðugt á sumri 2017 til gleði fyri bæði børn og vaksin. Í vár fóru Per Henrik og Oddmar undir arbeiðið at gera ein part av hinari helvtini, ið er ætlað til hugna og samkomur fyri yngra og eldra ættarliðið. Í summar kundu okkara borgarar og vitjandi halda bæði Country & blues-festival og vestanstevnu í hugnaliga umhvørvinum í miðstaðarøkinum. Vit gleða okkum til at víðka um økið og fáa tað uppaftur hugnaligari.

Asfaltering. Í mars í ár vóru vegurin á Tungu í Bø og ein partur av vegnum í Hagagerði í Billubønum asfalteraðir. Eisini ein gøta á Kvíggj fekk asfalt á. Samstundis fingu fólk høvi at asfaltera síni egnu tún.

Í november mánað var Kristian Olsen, tilbúgvingarleiðari í Sørvágs kommunu, á kommunuskrivstovuni og vísti umsitingini nýggja átaksleiðarabilin hjá sløkkiliðnum. Á myndini síggjast allir bilarnir hjá sløkkiliðnum. Tann nýggjasti er longst til vinstru. Hinir báðir eru frá 1985 og 2006

Fíggjarliga gongdin í 2019

Skattainntøkurnar hava higartil í ár roynst nógv betur enn mett í fíggjarætlanini fyri 2019. Sammeta vit fyrstu 11 mánaðirnir í 2018 og 2019, so var persónsskatturin í 2018 kr. 40.144.814 móti kr. 44.951.365 í 2019. Hetta er ein vøkstur upp á kr. 4.806.551, sum í prosentum svarar til 11,97. Endaligi skatturin verður tó ikki avroknaður fyrr enn um heystið árið eftir, og tá kunnu reguleringarnar broyta skattainntøkuna. Vit fáa væntandi 400 túsund krónur minni í partafelagsskatti enn tær 3.5 mió, sum mett var fyri FÆ2019. Raksturin plagar at vera á leið tað, ið samtykt er. Rakstrarútreiðslurnar í ár hava hildið nøkulunda á øllum økjum. Tó gjørdist økið 'Børn og ung' aftur í ár dýrari enn ætlað at reka. Tað er serliga grundað á vaksandi barnatalið í barnaansingini, ið gevur størri lønarútreiðslur enn ætlað. Tær eykajáttanir, ið gjørdust neyðugur at samtykkja, eru fíggjaðar við at flyta pening millum kontur (er

útreiðsluneutralt) og av tøkum peningi. Tær uml. 2 mió. krónurnar, ið vóru játtaðar at brúka eyka av tøkum peningi, fóru m.a. til serstovuna í skúlanum, nýggju bátabrýrnar og fyri stuðulstímar til børn við serligum tørvi í barnaansingini.

Á myndini niðanfyri síggja vit kommunuskattin frá 2012 – 2019:



Inntøkan fyri 2019 vísir 11 teir fyrstu mánaðirnar í árinum og mett, hvat inntøkan verður í desember.

P/f skattur 2012 – 2019:



Fíggjarstøðan

Sum áður sagt frá, so hevur ikki verið møguligt í hesum árinum at fremja allar tær ætlanir, bygdaráðið hevði sett sær fyri. Sum skilst, er einki óvanligt í tí! Allur peningurin, ið var settur av til løgur fyri 2019, er tí heldur ikki brúktur, og tíansheldur eru eingi lán tikin í árinum, sum FÆ2019 legði upp til. Ætlaði løguparturin fyri 2019 til útstykkingina á Middagsvarða verður brúktur, umframt at meira peningur er settur av fyri næsta ár. Ein partur av løguætlanini til nýggjar vøggustovur verður eisini brúktur í ár, tí arbeiðið er so smátt farið í gongd. Tað er helst ikki rætt at meta um, hvussu stór nettoskuldin pr. 1. jan. 2020 verður, men væntandi verður hon nakað minni enn við árbyrjan. Tað nágreiniliga talið fæst at vita, tá ið ársroknskapurin fyri 2019 verður samtyktur síðst í mai mánaða næsta ár.

Nettoskuldin í mió. krónum pr. 1. jan							
Ár	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Mió. kr.	23.1	20.0	14.3	23.1	25.7	18.9	

Eitt sindur um okkurt, ið eisini eigur at hava áhuga

Borgari nummar 1200 í Sørvágs kommunu, Sigmundur Guttesen í Bø, var borin í heim hin 17. november í 2018. Tað er fyrstu ferð, at fólkatalið í kommununi er komið upp á 1200. Í mars mánað var borgarstjórin og heilsaði upp á familjuna Helgu, Gutta, Baldur og Sigmund og handaði nýggja borgaranum blómutyssi og gávu.

Fólkatalið í kommununi er vaksandi og var 1. november í ár 1230. Í skrivandi stund eru 1238 borgarar í kommununi. Hetta er fyrstu ferð nakrantíð, at fólkatalið er so høgt. Vit fegnast sjálvandi um hesa góðu gongd og ynskja, at hon heldur fram.

Fólkatalið í kommununi pr. 1. jan.								
Ár	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Fólk	1084	1087	1079	1106	1128	1172	1202	

Á talvuni á næstu síðu sæst, at fólkatalið í okkara kommuna er vaksið við 2,6 prosentum frá 1. nov. 2018 – 1. nov 2019. Tað er altíð hugaligt, tá ið fólkatalið er vaksandi.

Fólkatalið í kommununum

Broytingar í fólkatalinum 1. nov. 2018 - 1. nov. 2019

	Fólka-talið 1.nov. 2018	Fødd	Deyð	Burðar-avlop	Inn-lendis netto-flyting	Flutt til Føroya	Flutt úr Føroyum	Netto-flyting tils.	Fólka-talið 1.nov. 2019	Broytt í tali	Broytt í %
Alt landið	**51.193**	**676**	**404**	**272**	**0**	**1.688**	**1.154**	**534**	**51.999**	**806**	**1,6**
Fugloyar	37	0	0	0	2	0	1	1	38	1	2,7
Viðareiðis	363	1	2	-1	-12	9	9	-12	350	-13	-3,6
Hvannasunds	407	10	3	7	-5	8	3	0	414	7	1,7
Klaksvíkar	5.167	63	47	16	-8	167	82	77	5.260	93	1,8
Kunoyar	146	1	0	1	5	8	5	8	155	9	6,2
Fuglafjarðar	1.528	28	15	13	26	51	24	53	1.594	66	4,3
Eystur	2.108	24	18	6	14	74	45	43	2.157	49	2,3
Nes	1.326	29	4	25	-23	27	24	-20	1.331	5	0,4
Runavíkar	4.028	55	28	27	-1	149	69	79	4.134	106	2,6
Sjóvar	1.068	18	16	2	-9	33	8	16	1.086	18	1,7
Eiðis	727	8	5	3	0	30	10	20	750	23	3,2
Sunda	1.797	24	14	10	-2	44	43	-1	1.806	9	0,5
Tórshavnar	21.544	304	151	153	-9	819	644	166	21.863	319	1,5
Kvívíkar	595	7	2	5	-4	7	13	-10	590	-5	-0,8
Vestmanna	1.220	7	9	-2	15	37	26	26	1.244	24	2,0
Vága	2.072	27	15	12	15	63	42	36	2.120	48	2,3
Sørvágs	1.199	19	12	7	17	25	18	24	1.230	31	2,6
Skopunar	459	2	6	-4	-10	7	8	-11	444	-15	-3,3
Sands	523	4	5	-1	10	6	7	9	531	8	1,5
Skálavíkar	137	0	0	0	6	0	0	6	143	6	4,4
Húsavíkar	112	0	1	-1	1	1	0	2	113	1	0,9
Skúvoyar	43	0	1	-1	-2	0	0	-2	40	-3	-7,0
Hvalbiar	673	7	8	-1	2	8	5	5	677	4	0,6
Tvøroyrar	1.705	15	11	4	-3	63	41	19	1.728	23	1,3
Fámjins	78	0	2	-2	2	3	1	4	80	2	2,6
Hovs	102	2	5	-3	-9	5	0	-4	95	-7	-6,9
Porkeris	320	4	1	3	-5	2	5	-8	315	-5	-1,6
Vágs	1.343	11	15	-4	-1	31	17	13	1.352	9	0,7
Sumbiar	366	6	8	-2	-12	11	4	-5	359	-7	-1,9

Kelda: Hagstova Føroya

Barnaverndartænastan í Vágum, ið virkar sambært lóg, er samstarv millum kommunurnar í oynni. Endamálið við barnaverndartænastuni er at tryggja, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum við at fáa ein tryggan uppvøkstur. Dentur verður lagdur á at finna loysnir, sum eru bestar fyri barnið. Lógin fevnir um ófødda barnið og øll børn og ung í aldrinum frá 0 til fylta 23. árið, ið eru stødd í Føroyum. Allir borgarar hava fráboðanarskyldu, og fakfólk hava skerpaða fráboðanarskyldu. Nærri kunning á: http://www.bvs.fo/

Barnaverndartænastan hevur eisini ábyrgd av **SSP-samstarvinum** í Vágum. SSP er ein tvørfaklig samstarvsskipan millum fakbólkar, ið virka millum børn og ung. Endamálið er at savna, samskipa og

fremja felags fyriskipanir, ið skulu fyribyrgja kriminalitet og skaðandi atburð. Nærri kunning á: http://www.bvs.fo/ssp

Kristina Háberg úr Havn var sett sum nýggjur leiðari fyri Barnaverndartænastuna í Vágum frá 1. september 2019.

Umhvørvisplássið (bingjuplássið). Tað er ókeypis at sleppa av við burturkast frá húsarhaldinum á umhvørvisplássinum. Heitt verður á fólk um at skilja burturkastið væl, ikki at seta rusk uttanfyri plássið og um at leiga bingju frá IRF, um tey hava nógv burturkast t.d. í sambandi við bygging, umbygging ella annað. Eru ivamál, so hevur IRF ein góða og kunnandi heimasíðu: http://irf.fo/

Virki, handlar og aðrar fyritøkur hava onga atgongd til umhvørvisplássið, men eiga ístaðin av hava egna avtalu við IRF um burturbeining av vinnuburturkasti.

Opið er soleiðis: týsdag kl.17-18, fríggjadag kl. 17-19 og leygardag kl. 16-18

Kommunan tálmar ferð við ferðsluskeltum. Í gomlu bygdini í Sørvági eru vegirnir bæði kringlutir og smalir, og teir kunnu tí vera ótryggir fyri fólk til gongu og akfør. Í vár varð samtykt í bygdaráðnum, at ferðin í miðbygdini skal ikki fara upp um 30 km/t, og tí eru fýra sonuskelti við hámarksferð sett upp uttan um miðbygdina. Vinarliga gevið hesum gætur!

Fíggjarætlanin 2020

Sørvágs bygdaráð samtykti á bygdaráðsfundinum mikukvøldið hin 27. november 2019 fíggjarætlanina fyri 2020.

Hesi eru høvuðstølini:

Mett skattainntøka:	48.323.000,-	
P/F skattur:	2.000.000,-	
Leiga:	764.000,-	
Skattur av eftirlønarinngjaldi:	9.520.000,-	
Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir:	3.943.000,-	
Útvegan av gjaldføri		
Tøkur peningur:	4.147.135,-	
Lánsgjald:	8.573.000,-	
Tilsamans:	77.270.135,-	
Rakstur:		51.319.000,-
Afturgjald av skuld:		2.451.000,-
Til íløgur:		23.500.000,-
Fíggjarætlanin javnvigar við:		77.270.135,-

Skattaprosentið verður 21,0%.

Barnafrádrátturin verður óbroyttur kr. 6.000,-

Síðstu árini hevur kommunan raðfest trivnaðin hjá børnum og ungum og at lætta um hjá barnafamiljum. Fyri stuttum var barnafrádrátturin hækkaður, barnaansingargjøldini lækkaðu munandi, ungdómstilboðið í Sýsluni varð sett á stovn, spæliplássið á Stakka var gjørt og svimjingin gjørdist ókeypis.

Sambært FÆ2020 skal lættin hesa ferð koma øllum skattaborgarum í kommununi til góðar. Næsta ár lækkar skattaprosentið við 0,7 prosentum til tað, tað var í 2014 – úr 21,7%'um niður í 21%. Hetta merkir, at skattaborgararnir fara at rinda umleið 1.6 mió. krónur minni í kommunukassan í 2020. Barnafrádrátturin næsta ár verður óbroyttur.

Samsvarandi fíggjarætlanini fyri 2020 er ætlanin at gera íløgur fyri 23.500 mió. kr. Íløgurnar verða fíggjaðar við góðum 9. mió. í rakstrinum, góðar 4 mió. verða útvegaðar av tøkum peningi, meðan restin góðar 8 mió. verða fíggjaðar við lántøku. íløgurnar eru innan hesi øki:

Almanna- og heilsumál:	1.800.000,-
Børn og ung:	10.000.000,-
Undirvísing:	800.000,-
Mentan og frítíð:	0,-
Teknisk mál:	5.900.000,-
Kommunal virki:	5.000.000,-

Eins og borgarum í kommununi er okkum í bygdaráðnum fullgreitt, at tað eru fleiri uppgávur og arbeiði í øllum bygdunum í kommununi, sum liggja á láni. Nevnast kann t.d. vegirnir, ið veruliga hava ábøtur og asfalt fyri neyðini. Teir eru illa farnir, og nýgerð og dagføring av teimum fara at krevja milliónir av krónum. Okkum er kunnugt, at tað eru fleiri onnur átrokandi mál at avgreiða. Øll bygdaráð eru í tí støðu, at tað fyrst og fremt er fíggjarorkan í kommununi, ið ásetir, hvørjar íløgur kunnu gerast. Men tað er eisini soleiðis, at onkuntíð verður eitt bygdaráðið noytt at raðfesta somikið átrokandi mál, ið ikki slepst undan at avgreiða. Sitandi bygdaráð hevur tí raðfest tær íløgur fyri næsta ár, ið vit meta eru alneyðugar.

Ein av fremstu og týdningarmestu uppgávunum hjá einari kommunu er at tryggja, at karmarnir hjá børnum, ungum og teimum gomlu og óhjálpnu eru nøktandi. Góð helvtin av íløgujáttanini fyri 2020 (12.6 mió.) fer tí eisini til økini almanna- og heilsumál, børn og ung og undirvísing - t.e. heimið á Sýnini, nýggjar vøggustovur og skúlan. Nærum 6 mió. fara til teknisk mál, ið fevna um m.a. útstykkingina, fríðkan av kommununi og kloakkir. Seinastu 5 mió. fara til kommunal virki, sum umfata iløgur til havnir og lendingar – herí nýggjar bátabrýr.

Kommunan hevur sett 1.8 mió krónur av á FÆ2020 til **Heimið á Sýnini**. Við teimum krónunum vóna vit, at kjallarahæddin verður liðug – og helst komandi ár.

Tað gjørdist okkum greitt í fjør heyst, at neyðugt verður at útbyggja dagstovnin **Alvalon.** Tað slepst ikki undan! Fólkatalið í kommununi – og harvið eisini barnatalið - er vaksandi, og ein kommuna skal veita øllum børnum ansingarpláss, so foreldrini sleppa til arbeiðis. Í løtuni er sera trongligt í Alvalon, har hvør krókur verður brúktur, og Sýslan verður brúkt til elstu børnini (tey 6-7 ára gomlu), sum frítíðarskúli og sum ungdómshús. Vit í kommununi eru sera takksom fyri vælviljan og tolið, sum starvsfólkini vísa okkum.

Í november mánað var eitt skitsuuppskot frá Westtech samtykt á bygdaráðsfundi. Sambært tí fer nýggi bygningurin, sum fer at verða bygdur omanfyri vegin við einari smogu undir vegnum oman í Alvalon, at rúma fýra vøggustovum og einum fyrisitingarbygningi við hølum til leiðslu og starvsfólk, øðrum fundarhølum og einum rúmi til húsavørðar. Møguliga verður byrjað við prosjektering, útgrevstri og planering longu í ár, og vit vænta, at verkætlanin verður klár at bjóða út tíðliga í vár, soleiðis at arbeiðið at byggja kann byrja á sumri 2020. Vónandi standa nýggju vøggustovurnar klárar at flyta inn í seinnu helvt av 2021. Bygningurin verður umleið 800 fermetrar til støddar og fer væntandi at kosta okkum umleið 20 mió krónur. Hendan neyðuga íløgan fer at ávirka íløgumøguleikarnar hjá kommununi tey næstu árini. Á FÆ2020 er helvtin av kostnaðinum, kr. 10 mió., settar av.

Skúlin í Sørvági hevur fingið eina dagføring/høvuðsumvæling síðstu árini, svimjihøllin fekk nýggja ventilatiónsskipan í fjør og serstovan er gjørd í ár, so hon er tíðarhóskandi til teir næmingar í oynni, ið hava tørv á einum serligum skúlatilboði. Hóast fimleikahøllin og glasparturin millum høll og svimjihøll enn eru eftir at umvæla, loyvir íløgukarmurin fyri næsta ár ikki hesum. Tó er peningur (ein hálv millión) settur av á FÆ2020 til ymisk arbeiði, sum ongantíð eru gjørd liðug ella ikki eru nóg væl fráfarin. Talan er m.a. um luftskipanina, trappur og gólv. Harumframt eru nakrar fáar hundrað túsund settar av til annað, ið ein nøktandi arbeiðsdagur hjá lærarum og næmingum krevur. Tað kann umfata t.d. innbúgv og tøkni.

Á **tekniska økinum** er settar av 5.9 mió. krónur, og vit rokna við at fáa umleið tvær mió. inn aftur, tá ið grundøkini á Middagsvarða verða seld.

Fyri næsta ár eru 6 mió. krónur settar av til **byggibúning**, Tað er til grundstykkini/útstykkingina á Middagsvarða. Sum áhugin vísir seg at vera beint nú, vænta vit at selja fleiri av grundøkjunum longu næsta ár. Tey verða gjørd byggibúgvin, so klárt verður at seta formarnar á, og serlig byggisamtykt verður fyri einstaka stykkið, so øll sethúsini fáa eitt rímiliga gott útsýni yvir bygdina og fjørðin. Kommunan fer í næstum at gera klárt, so vit vita, hvat endaligi søluprísurin verður fyri hvørt stykki.

Á kontuna **fríðkan av kommununi** eru settar 1.4 mió. krónur av. Íroknað hesum eru 300 tús. kr til **spæliðplássið í Bø**. Ynski hevur verið um at fáa tað gjørt meira innbjóðandi og dámligt. Í samráð við bíggjarfólk, verður farið at hampa um tað.

Tey flestu av okkum minnast, tá ið nýggjárhald og onnur savnandi tiltøk vóru hildin mitt í bygdini. Síðstu árini eru hesi flutt úr bygdini, har ferðslan er tung og nógv, og oman á Stakka. Sitandi bygdaráð sær fyri sær, at væl ber til at víðka um økið og at skapa eitt væl skipað miðstaðarøki, sum skal vera karmur um ymisk tiltøk innan mentan og ítrótt.

Dansistovan er ein partur av hesum miðstaðarøki. Og tað er helst eingin loyna, at meirilutin í bygdaráðnum hevur ætlanir um, at hon skal takast niður. Tí varð hon keypt beint fyri jól í fjør.

Á fíggjarætlanini fyri 2020 er ein mió. kr. settar av til at fríðka miðstaðarøkið og til dagføring av byggisamtyktini. Ætlanin er at biðja 3-4 arkitektavirki gera eina ætlan fyri økið, so vit kunnu fáa eitt sindur av íblástri til, hvat kann gerast á staðnum, og hvussu økið kann brúkast, so tað fellir væl inn í bygdamyndina og náttúruna á staðnum. Hesi uppskotini frá arkitektavirkjunum skulu síðan gerast grundarlag undir einum borgarafundi á vári 2020, har borgarin fær møguleika at síggja hugskotini og geva sína meining til kennar, hvat gerast kann við økið.

Sementplatturin millum kirkjugarðsportrið og kirkjuhurðina er rivnaður. Nakað eyka av peningi er settur av á rakstrarkontuna fyri kirkjugarðin, so kommunan í samráð við kirkjuráðið fær umvælt og hampað plattin næsta ár.

Lutfalsliga stórur partur av krónunum til íløgur hevur verið settur av til dagføring av **spillivatnsætlanini** síðstu trý árini. Hóast okkurt er gjørt, og stórur bati er, so fer helst drúgv tíð at ganga, innan vit eru komin á mál, tí arbeiðið er sera umfatandi. Tað, at Pól Sigmund, ið ger arbeiðið fyri okkum, hevur verið so upptikin av nógvum øðrum uppgávum, hevur við sær, at tað er ikki komið

so nógv burturúr kloakkeringsarbeiðinum hjá okkum í ár, tíverri. Fyri næsta ár hava vit sett 500 túsund kr. av til framhaldandi dagføringar.

Í fjør var annað av tveimum spillivatnsfrárenslurørum lagt út á sjógv í Bø. Síðani tá hava vit fýra ferðir fingið hjálp frá Sp/f Fílinum at reinsa rørið, tí tað hevur verið typt. Tað er einki galið við skipanini, sum eisini verður brúkt aðrastaðni í landinum, lata teir okkum vita. Men skal nytta fáast burturúr, er alneyðugt, at einki annað enn væta fer í frárenslið. Tí heitir kommunan staðiliga á fólk um at ansa eftir.

Farið var undir at skifta gøtuljósini í bygdunum til orkusparandi **LED-ljós** í ár. Hetta fara vit at halda fram við, tí ætlanin er, at øll ljósini yvir eitt áramál verða skift til LED-ljós. Vit gera tað í smáum, soleiðis at vit brúka góðar 100 túsund krónur hvørt ár.

Bátabrúgvin í bátahylinum, sum er skift, roynist væl, eisini í ringum veðri. Vit hava tíbetur bara fingið jaligar viðmerkingar. Tær 5 mió. krónurnar, ið eru settar av innan kommunal virki, fara til at skifta báðar tær innaru brúgvarnar og til at tøma ávísa nøgd av sandi og eyri í bátahylinum, soleiðis at lættari verður at sigla til innaru armarnar.

Bygdaráðsfundir 2020.

Bygdaráðið hevur ásett føstu bygdaráðsfundirnar fyri 2020. Fundirnir verða kl. 17:00 í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni niðanfyri nevndu dagar.

Mikukvøldið 22. januar

Hóskvøldið 27. februar

Hóskvøldið 26. mars

Mikukvøldið 29. apríl

Mikukvøldið 27. mai

Mikukvøldið 24. juni

Mikukvøldið 02. september

Mikukvøldið 30. september

Mikukvøldið 28. oktober

Mikukvøldið 11. november

Mikukvøldið 25. november

Mikukvøldið 12. desember

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri fundin.

Eykafundir ella broytingar í skránni verða lýstir á svørtu talvu á kommunuskrivstovuni og á heimasíðuni hjá Sørvágs kommunu.

At enda

2019 er av álvara farið at halla, og brátt skriva vit 2020.

Vit vita sjálvandi ikki, hvussu 2020 fer at vignast, men vit fara við góðum treysti inn í tað nýggja árið og taka við teim uppgávum og avbjóðingum, sum tað nú einaferð fer at geva okkum.

Vit, sum eru vald í bygdaráðið, vilja altíð og eftir bestu sannføring stjórna allari kommununi so væl, sum til ber. Endamálið er, at í okkara kommunu skal vera gott bæði at búgva og virka.

Til seinast fari eg vegna bygdaráðið og starvsfólk okkara at ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

Sørvági, á tollaksmessu 2019

Vinarliga

Sørvágs kommuna

Aimé Jacobsen, borgarstjóri

Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlanina fyri 2020

		Játtan		
		Rakstur og útlán		
	Túsund kr.	Útreiðslur	Inntøkur	Løgur
§1.	**Kommunal fyrisiting**	**4.108**	**-**	**-**
	11. Felagsútreiðslur	4.108	-	-
§2.	**Almanna- og heilsumál**	**19.057**	**764**	**1.800**
	20. Heilsumál	1.551	-	-
	21. Almannamál	17.506	764	1.800
§3.	**Børn og ung**	**10.872**	**-**	**10.000**
	26. Barnaansing	10.872	-	10.000
§4.	**Undirvísing**	**4.377**	**-**	**800**
	23. Útbúgving og gransking	4.377	-	800
§.5.	**Mentan og frítíð**	**2.889**	**-**	
	23. Útbúgving og gransking	593	-	-
	24. Mentan	2.296	-	
§ 6.	**Teknisk mál**	**5.524**	**-**	**5.900**
	11. Felagsútreiðslur	1.505	-	1.400
	22. Íbúðarmál	-	-	4.000
	24. Mentan	350	-	-
	30. Umhvørvi	722	-	500
	38. Samferðsla og samskifti	2.947	-	
§ 7.	**Kommunal virki**	**3.706**	**-**	**5.000**
	30. Umhvørvi	2.465	-	-
	31. Tilbúgving	571	-	-
	38. Samferðsla og samskifti	671	-	5.000
	Tilsamans	**50.533**	**764**	**23.500**
§ 20.	22. Íbúðarmál	650	-	-
	35. Sjóvinna	-	-	-
	50. Rentur	136	-	
	52. Skattir og avgjøld	-	63.786	-
	Tilsamans	51.319	64.550	23.500
	Yvirskot	-	13.231	-
		Útreiðslur	**Inntøkur**	**Yvirskot**
	Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÙ	**-**	**-10.269**	**-**
§25.	60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m."	-	4.147	-
	Nettokassaúrslit	**-**	**-6.122**	**6.122**
§25.	62. Afturgjald av skuld	2.451	-	-
	Bruttokassaúrslit	**2.451**	**-6.122**	**8.573**
	Fígging:			
§25.	64. Útvegan av gjaldføri	-	8.573	-
	Fíggjan í alt:	-	8.573	8.573
	Samanlagt	**2.451**	**2.451**	**-**

Høvuðsyvirlit yvir roknsskapin fyri 2018

		Játtan		
		Rakstur og útlán		
	Túsund kr.	Útreiðslur	Inntøkur	Løgur
§ 1.	**Kommunal fyrisiting**	**3.526**	**74**	**-**
	11. Felagsútreiðslur	3.526	74	-
§ 2.	**Almanna- og heilsumál**	**16.577**	**-**	**1.276**
	20. Heilsumál	1.498	-	-
	21. Almannamál	15.080	-	1.276
§ 3.	**Børn og ung**	**9.383**	**-**	**848**
	26. Barnaansing	9.383	-	848
§ 4.	**Undirvísing**	**4.384**	**-**	**300**
	23. Útbúgving og gransking	4.384	-	300
§. 5.	**Mentan og frítíð**	**2.322**	**-**	**1.912**
	23. Útbúgving og gransking	633	-	-
	24. Mentan	1.689	-	1.912
§ 6.	**Teknisk mál**	**5.459**	**-**	**3.732**
	11. Felagsútreiðslur	1.113	-	526
	22. Íbúðarmál	-	-	2.792
	24. Mentan	443	-	-
	30. Umhvørvi	478	-	809
	37. Handil og vinna annars	-	-	-768
	38. Samferðsla og samskifti	3.425	-	373
§ 7.	**Kommunal virki**	**4.418**	**-**	**495**
	30. Umhvørvi	2.856	-	-
	31. Tilbúgving	457	-	-
	38. Samferðsla og samskifti	1.105	-	495
	Tilsamans	**46.068**	**74**	**8.563**
§ 20.	22. Íbúðarmál	631	-	-
	35. Sjóvinna	-	-	-
	50. Rentur	258		
	52. Skattir og avgjøld	-	62.258	-
	Tilsamans	46.956	62.333	8.563
	Rakstrarúrslit	-	**15.377**	-
		Útreiðslur	**Inntøkur**	**Yvirskot**
	Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÙ	-	**6.814**	-
§ 25.	60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m."	3.927	987	-
	Nettokassaúrslit	**3.927**	**7.801**	**4.941**
§ 25.	62. Afturgjald av skuld	3.873	-	-
	Bruttokassaúrslit	**7.801**	**7.801**	
	Fígging:			
§ 25.	64. Útvegan av gjaldføri	-	-	-
	Fíggjan í alt:	-	-	-
	Samanlagt	**7.801**	**7.801**	**-**